

Eyðun Joensen

# Herðaklapp til Útvarp Føroya

*Komin úr aftur Kringvarpsstýrinum, má tað vera loyvt mær sum vanligur lurtari at fegnast um tað, sum ÚF hóast alt framvegis útinnur lurtarum til gleði og gagns.*

Hugsað verður í hesum umfari bert um **morgumlestrarnar**, sum ein stórur meiriluti av fólkinum so staðiliga vildu varveita við endursending um framfaringatíð hjá aldrandi fólkum heima eins og á røktarstovnum.

Tað var aftaná ávíst brúkaratrýst heppið, at vit, skil og rættar kenslur umsíðir vunnu á treiskni, hugmóði, valdi og trongari mentannartilvitsku hjá nýggjum kveiststrum.

Morgumlestrar eru afturvið góðum, nýupptiknum sálmasangi dagligur lívs-vísdómur og daglig siðvenja fyri mong á sjógvi og landi, til verka so væl sum í ellini og í dagsins meldri ein tiltrongd still løta.

Tó at onnur eyðvitað eisini høvdu dugað, eru tað prestar ,sum skriva og gott tað sama, tí so gerast lestrar stuttir, greiðir og tignarligir og uttan at hoyggja bibliuna í gjøgnum við alskyns bibliusitatum og málageipi afturvið.

Ofta er tað eitt vikutema við samanhangi í , t.d. í tráð við kirkjuárið og mangan eisini við heimsspekiligum íkasti , stutt og greið orð til dagin og vegin.

Lestrar valdast, ikki í dygd, men í ymiskleika alt eftir hvør skrivar, men bara gott tað sama, tí tað ber í sær fjølbroytni og forvitni millum lurtarar.

Plægi at lurta , ofta bert hissini eftir fyrru sending kl.7.10 og so ordiliga umaftur kl.10.10, tá og um nakað serliga sigandi hevur fangað og annars bert at njóta enn eina tiltrongda, stilla løtu.

Síðani er tað sálmasangurin, har nýggjar upptøkur hjá Hansen, Armgarð og Sólstein í sjálvum sær er ein boðskapur afturat. (Ætlaði mær at fáa hendur á hesa frálíku fløgu, men gakk, hon var straks útseld, og veit eg hana ikki endurprentaða enn, sum í sjálvum sær má undra í einum støðugt pengingatrongdum kringvarpi).

Annað, sum sjáldan verður tikið fram, er sjálvur upplesturin, har fólk í ymsum kirkjusóknum, helst útvald av presti, lesa.

Av tí at kirkjusóknir eru víða hvar um landið, fáa vit at hoyra ymiskt mergjað bygdarmál, og hóast røddir hava verið frammi um standardiserað føroyskt (mið)-mál, so er tað so vælgerandi at lýða á okkara fjølbroytta bygdarmál víða hvar.

Vit skulu varðveira bygdarmálini, tí tey hoyra til okkara samhaldsfasta samleika sum føroyingar, og ikki bilar hjá fólki flest at skilja, síðani tekstir og innihald ofta eru kend.

Framburður hava eins og tekstir nakað við estetik at gera, og má eg av mongum, og uttan at seta nakran eftir, siga, at tá IPD, prestur í vetur skrivaði og MS las á so góðum og greiðum vágamáli, tá fekst bæði ein heimspekilig/gudilig og mál-estetisk uppliving alt um eina leið.

Gamaní eru tað kanska mest aldrandi fólk, sum líða á morgumlestrar, og tí er tað umráðandi, at lestrar vera bornir fram greitt , skilliga og við sóma. Aðrastaðni fáa fólk (sjónleikarar, upplesarar og miðlafólk) frálæru í slíkum, men í morgumlestrarhøpi eiga vit mong náturutallent í so máta, vísir tað seg.

Væl er sálmasongurin av tí forna slagnum uttan nútímans trummur, slagverk og annað gykl, men hann er væl framborðin og upptikin og í sjálvum sær ein frægd at líða á. Tøkk fái KVF fyri nýggjar upptøkur ,og at tit síðani eisini hava leitað inn um samkomugátt at taka upp.

Væl telja morgumlestrar, sálmar og sangir bara heilt fá prosent av samlaðu senditíðini, harav morgunlestrarnir uml. 1,5 % íroknað endursending, men tað er væl farið til tey mongu áhugaðu, sum fegin ella tvungin gjalda fyri eisini alla hina sendiflatuna í ÚF.

Morgumlestrar hava higartil verið góð, føroysk siðvenja í ÚF í yvir hálva øld.

P.S.: Tá nýggjur DR-stjóri tók við farna heyst, segði daman seg sum mest vilja savna donsku tjóðina gjøgnum danska kringvarpið.

Sjálvur meti eg, at ÚF eisini við sínum morgumlestrum, andaktum, sálmum og sangum er við til at savna føroyingar um hóast alt okkurt felags, tí í tí førinum verður neyvan skeitt til samkomutilknýti, men at so mong lurta ella hyggja, óansæð hvør borðreiðir og hvussu.

Men mín sann um ikki nýggi, danski kringvarpsstjórin herfyri eisini ætlaði at skerja teirra morgumlestrar, tó fólk staðiliga mótmæltu og harvið kanska fingu stjóran at hugsa seg um av nýggjum.

Og fjálgt kendist tað, tá eg snimma í morgum tendraði lurtini, og undansálmurin/dymbuldagasálmur ljómaði úr ÚF.

So varð í ÚF skrúvað niður og prestur at lesa, men gakk, sami sálmur ljómaði framvegis , til eg varnaðist meg eisini hava skrúvað DR2 frá , sum samstundis sendi sín morgumlestur og snøgt sama sálma.

Góðar páskir.

---

Nevndin fyri Unga Sjálvstýri

# Overdrivelse fremur ikki altíð forståelsen

*Aftursvar til lærararnar í donskum, sum mótmæla, at danskt á hástigi kann verða vallærugrein í miðnámsskúlunum.*

Fyri einum mánaða síðani skrivaði Unga Sjálvstýri eitt skriv til fjølmiðlarnar, har vit tóku upp aftur kjakið um, hvørjar umraðfestingar kundu gerast á skúlaøkinum. Vit komu m.a. inná, at danskt á hástig ikki átti at vera ein kravd lærugrein á miðnámsskúlunum, og at vit heldur áttu at raðfest enskt. Síðani hevur nógv verið at sæð og hoyrt til hetta evnið, og tað eru vit í Unga Sjálvstýri sjálvandi sera fegin um. Sum heild kann sigast, at vit hava merkt jaligar afturmeldingar.

### Mótmælið tilmælið

Tað kundi væntast at miðnámsskúla lærarar fóru at mótmæla tilmælinum sum landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, herfyri fekk, um at gera danskt á hástig um til eina vallærugrein. Lærararnir hava síðani í einum opnum brævi til mentanarnevnd løgtingsins víst sína ónøgd.

Tá talan er um lærarar á miðnámsskúlum, væntaðu vit einki minni enn, at tað fór at vera væl orðað og gjøgnumhugsað, men mugu vit ásanna, at tað var tað ikki. Undirritaðu lærararnir tykjast at hava púrasta misskilt tilmælið. Lærarirnir leggja í brævinum fram sína søk ímóti tilmælinum, og í síni roynd gera teir fleiri mistøk, nýta í høvuðsheitinum einans próvgrundir, sum kunnu sigast at vera beinleiðis "logical fallacies", og vísa, at teir als ikki hava skilt, hvat tilmælið snýr seg um.

### Próvgrundirnar halda ikki

Sum vit skilja tað, er hetta kjarnan í teirra høvuðs próvgrund:

"..fleiri og fleiri íslendskir ungdómar velja at taka útbúgving í Danmark og øðrum Norðurlondum. Sambært heimasíðuni hjá Háskóla Íslands velja 65% av teimum íslendingum, sum ætla at lesa uttanlands, at fara til onnur Norðurlond, og av hesum fara 60% til Danmarkar" .. "Hvørki íslendingar ella føroyingar duga danskt av sær sjálvum, og hvørvur danskt sum lærugrein í føroysku skúlunum, fer tað at taka nógv ár at byggja førleikan í donskum uppaftur."

### Próvgrundin er ein logiskur skeivleiki á tveir hættir.

Fyri tað fyrsta er próvgrundin tað man kallar ein strámaður, tí tey argumentera ímóti eini søk, sum ongin í veruleikanum hevur lagt fram. Tey argumentera sum um, at onkur hevur sagt, at vit als ikki skulu undirvísa í donskum. Veruleikin er

*Framhald á næstu síðu*